# sum glæsiligt bókaverk




*Suni Merkistein við nýggju bókini »Teir reystastu dreingir í Norðum«*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

## Tað hevur verið talan um eitt ógvuliga krevjandi arbeiðið

um hjartað um, at næsta fjallið er meir enn hálvgingið.

### Ivaðist eitt sindur um býtið

Tá ein skal varpa ljós á eina søgu, sum er eina og eina fimtings øld gomul, so ger ein sær eisini nakrar tankar um hvussu bókaverkið skal skipast.

– At tað skuldi gerast talan um trý bind, var heldur ikki nakað, sum var greitt beinavegin. Eg drálaði eitt sindur við tí. Eg hugsaði við mær sjálvum, at tað fór neyvan at bera til at savna alt í eitt bind, møguliga tvey bind, møguliga trý bind? Av royndum veit eg, at tilfarið hevur hug at hópa seg upp, men tað kom lutfalsliga seint, at eg gjørdi av at skipa hendan leistin, greiðir Suni frá. Fyrsta tíðarskeiðið er ikki so ræðuliga hendingarríkt.

– Fá feløg eru stovnað tá, og tær skipaðu kappingarnar komu ikki fyrr enn seinni. Tað er rættiliga langt ímillum teir tilburðirnar, sum hava søguligan týdning hesi fyrstu 70 árini. Hetta gjørdi so, at eg valdi at strekkja hesa bókina fram til 1960. Tað er meira tilfar at fara eftir í teimum báðum næstu bókunum, sum fevna um tíðarskeiðið 1960-1990, og frá 1990 og fram til okkara dagar, slær Suni fast. Suni undirstrikar tó, at tað kortini gjørdist nóg nógv at fara eftir til ta fyrstu bókina.

### Marni Mortensen finnur úrslitini

Tað hevur eydnast Suna at finna tilfar, sum ikki hevur verið frammi áður.

– Eg var ikki so vísur í, at tað fór at eydnast mær at finna tilfar, sum ikki hevur verið frammi áður. Vit hava fingið øll úrslitini, og tað er í sær sjálvum stuttligt. Tað hevur ongantíð verið lætt at fáa øll innanhýsis úrslitini í FM-høpi. Øll tey funnu úrslitini eru tó ikki nakað, ið eg sjálvur havi funnið. Marni Mortensen frá faroesoccer.com hevur arbeitt við hesum í eitt nógv longri tíðarskeið, enn eg havi sjálvur. Tað hevur verið talan um eitt ógvuliga krevjandi arbeiðið. Ein trýr, at tað er bara so líkatil at blaða í nøkrum bókum og gerðabókum, og spyrja seg fyri handa vegin og hinvegin, og so man alt óivað falla uppá pláss, men tað er tíverri ikki so einfalt, tí úrslitini eru ikki so væl frágingin allastaðni. Vit hjálptust so í felag at fáa teir seinastu brikkarnar uppá pláss, fortelur Suni í takklæti fyri tann stóra og týdningarmikla leiklutin hjá Marna Mortensen.

### Uppstillingar eru við

Tað sum eisini er við til at lyfta bókina, bæði søguliga, fótbóltsliga og grafiskt er, at Suni hevur liðuppstillingarnar hjá øllum føroyameistarum í bestu fótbóltsdeildini millum 1942 og 1959 á einari talvu, sum hevur ein grønan vøll sum bakgrund. Suni hevur eisini útvegað hvussu føroyska landsliðið hevur stillað upp í landsdystum ímóti Hetlandi og Íslandi millum 1930 og 1959. Beint uppiyvir tað grafiska yvirlitið við liðuppstillingum eru úrslitini frá »Meistaradeildini«, sum besta fótbóltsdeildin nevndist miðskeiðis í 20. øld, umframt ta endaligu støðuna fyri hvørt kappingarárið. Grafiska arbeiðið hjá Barbaru Biskopstø er eisini avgjørt við til at lyfta bókina, staðfestir Suni.

### Heydrich í Gundadali í 1923?

Millum mongu spennandi frásagnirnar í bókini hjá Suna Merkistein, er ein serligur tilburður frá 1923. Týski krússarin og skúlaskipið »Berlin« lá við bryggju í Havn. Hetta var um ólavsøkumundið hetta árið, og tveir dystir vóru spældir millum HB og menn frá »Berlin«. HB vann fyrra dystin 3-2, og tann seinna dystin 5-2. Heili 700 áskoðarar vóru til tann fyrra dystin, og 500 áskoðarar vóru til tann seinna dystin. Ein 19 ára gamal unglingi var mynstraður umborð á tí týska krússaranum. Reinhard Heydrich æt tann ungi maðurin, sum gott 20 ár seinni skuldi gerast illa gitin í heimssøguni, sum eitt hitt ringasta bølmenni nakrantíð. Heydrich var dugnaligur ítróttarmaður, serliga sum fiktari, og Suni heldur tí, at tað er væl hugsandi, at Reinhard Heydrich hevur spælt við ímóti HB. Á felagsmyndini, sum er tikin uttanfyri »Reinerts Kafé« – har sum Frelsunarherurin heldur til nú – sæst ein ungur maður, sum er ógvuliga meinlíkur Reinhard Heydrich. Ein sjáldsom anekdota, sum Suni hevur funnið fram til, og samstundis eitt dømi um tað stóra nærlagnið, sum liggur aftanfyri bókaverkið um ta føroysku fótbóltssøguna. Suni Merkistein hevur lagt enn ein ítróttarligan bókavarða, og vit eru sera mong, sum við stórum spenningi kunnu síggja fram til summarið og ljósari dagar, tá Suni leggur bókina fram um tað næsta tíðarskeiðið, sum er frá 1960 til 1990.

heris@sosialurin.fo